


# PRIX

NR. 48 • TÝSDAGUR • 11. MARS 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

**5. umfar**

Leygarkvøldið var fimta innleiðandi umfar í Prix Føroyum hildið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bólkarnir spældu í hesi røð:
Gestir
Týr
Blív
Zink
Jam
Hatespeech

10 dómarar mettu um avrikini á pallinum, og teir dømdu út frá fimm ymiskum krøvum um millum annað tónleikaliga dygd, spæl og framførslu.

Hatespeech var nummar 1 og vann sær pláss í finaluni. Gestir vóru nummar 2 og skulu spæla í hálvfinaluni saman við fýra øðrum bólkum, har besti bólkurin fær eitt finalupláss.

# Gestir komnir fyri at verða



*Ólavur Hansen stóð sterkur sum frontmaður í bólkinum Gestir. Aftanfyri sæst yngri beiggi hansara, Torfinnur Jákupsson, sum spælir gittar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Brøðurnir Ólavur og Torfinnur hava spælt saman í nógv ár, men teir hava ikki verið hvønndagsgestir á føroyska tónleikapallinum. Leygarkvøldið sendu teir bólkin Gestir víðari í Prixnum**

BRØÐUR
*Eyðun Klakstein*

Ein nýggjur bólkur steig rættiliga inn á føroyska tónleikapallin leygarkvøldið, tá seinasta undanumfarið í Prixnum varð hildið í Fuglafirði.

Gestir hava spælt til onkra smærri konsertir, men nú royndu teir seg á Prix-pallinum, har nógv eygu og oyru eru vend í hesum døgum. Bólkurin legði fyri leygarkvøldið, og teir komu sera væl frá framførsluni, sum eisini bar teir fet víðari í kappingini, so at teir komandi leygarkvøldið verða við í hálvfinaluni í kappingini.

Bólkurin spælir sveimandi rocktónleik, sum roynir at ganga nýggjar leiðir – í øllum førum, tá ið tað snýr seg um føroyskan tónleik – og so syngja teir eisini á føroyskum.

## Heimabryggj

Sentralu tónleikararnir í bólkinum eru brøðurnir Ólavur Hansen og Torfinnur Jákupsson.

21 ára gamli Ólavur er sangari og spælir gittar, meðan 19 ára gamli Torfinnur spælir gittar. Teir hava spælt nógv saman, men teir hava verið lítið frammi.

– Vit hava fyri tað mesta spælt heima. Tað hava vit gjørt í nógv ár nú. Vit hava skrivað løg og tekstir, og tað eru komið nógv tilfar burtur. Nakað av tí brúka vit nú í Gestir, sigur Torfinnur.

– Vit hava tikið okkara løg og yrkingar við til bólkin, og so hava vit sett sangirnar saman í felag.

## Serligt samband

Knút Eysturstein, sum spælir ljómborð í bólkinum, heldur, at teir báðir høvuðsmenninir í bólkinum hava eitt serligt samband.

– Teir hava spælt nógv saman, og tað ger, at teir skilja ómetaliga væl hvønn annan. Teir hava ikki brúk fyri at tosa so nógv saman, teir situr bara hjá teimum, sigur hann.

Ólavur og Torfinnur hava ikki verið sjónligir á føroyska tónleikapallinum, men tað er ivaleyst broytt nakað eftir leygarkvøldið, tá ið teir vóru drívmegin í eini frálíkari framførslu.

– Vit hava ikki spælt so nógv alment, men nú verður tað vónandi til meira. Tað gekk væl hjá okkum í kvøld, og nú fara vit at venja fram ímóti seinasta umfarinum, segði Torfinnur eftir kappingina leygarkvøldið.

Og brøðurnir og hinir í bólkinum vera vónandi afturvendandi gestir á føroyska tónleikapallinum komandi tíðina.

Leygarkvøldið fara teir í øllum førum at kappast um seinatsta finaluplássið í Prixnum.

## Fimm bólkar fáa ein kjans afturat

Teir fimm bólkarnir, sum eru vorðnir nummar 2 í teimum innleiðandi umførunum í Prixnum, fáa nú ein kjans afturat í kappingini.

Leygarkvøldið verður hálvfinalan, og tá skal seinasti finalisturin finnast.

Bólkarnir, sum framvegis hava møguleika at koma við til endabrestin í kappingini, eru Headache Blues Treo, Mind's Eye, Lawetz, Fluffy Toys og Gestir.

Ein av hesum bólkum kemur í finaluna, meðan hinir verða sendir úr kappingini.

Teir fimm finalistarnir, sum longu eru funnir, eru: MC Hár, Déjá Vu, Braquet, Makrel og Hatespeech.